# Heimskendur svenskur rokkyrkjari



Svenski rokkyrkjarin Ingemar Olsson byrjaði at spæla mitt í 60'árunum og er nú gamal í garði, tá ið tað kemur til kristnan tónleik. Ingemar byrjaði sum gittarleikari og sangari í ymiskum bólkum í Stokkhólmi, og framførdi við bólkum sínum á popp klubbum, sjónleikarhúsum og øðrum spælistøðum.

Veruliga gjøgnumbrotið kom í 70'árunum, tá ið Ingemar fekk sín fyrsta útgávusáttmála og kom fram á bæði sjónvarps- og útvarpsrásum um alt landið. Tekstirnir frá hesum tíðarskeiðinum eru um Gud, samfelagið og sambandið millum menniskju.

Ingemar hevur eisini spælt í Norðurlondum, USA og Evropa. Um aldarskiftið kom fløgan „Cry for Life" út. Hendan útgávan var úrslit av samstarvi við Oslo Gospel Choir.

Fleiri av hansara sangum, bæði frá hansara ungu døgum og eisini teir nýggju, verða í dag sungnir um allan heimin og hava eisini verið í toppinum á svensku hittlistunum.

# Frekur og nútímans trubadurur



Í singer/songwriter kappingini í fjør vetur trein eitt nýtt talent á føroyska tónleikapallin. Petur Háberg vísti síni kynstur sum lagsmiður og sangari, tá ið hann vann seg í finaluna í kappingini.

Tað sum eyðkennir tónleikin hjá Petur Háberg er, at tað er kristin tónleikur í einum nútímans hami. Hóast Petur er ein sokallaður singer/songwriter, so eru løgini hjá Petur rættiliga rokk/poppkend.

Tá ið Petur luttók í kappingini í fjør vann hann sær nógv hjørtu. Í finaluni var hann ein sannur puplikums-favorittur. Hetta tók ongan á bóli tí at hann var sera undirhaldandi at hyggja og lurta eftir.

Hann er ein fínur gittarleikari, men hansara veruliga styrki er røddin. Hann syngur nokkso frekt og arbeiðir nógv við tí trýsti, ið hann leggur á røddina. Hetta gevur tónleikinum eina eyka dimensión.

Petur er ikki bangin fyri at greiða frá hvat ið løgini snúgva seg um, og hann smæðist ikki fyri at siga eina stuttliga søgu




